# Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark

# Ársfrágreiðing

# 2024

## Innihaldsyvirlit


Rágevingin – um stovnin 3

Nevndarátekning 5

Innleiðing 6

Átaksøki i Ráðgevingini 7

Miðlan 8

Málbólkar – leistur í frágreiðingini 8

- Lesandi 8
  - Pisudagar
  - Samstarv
- Sjúklingar 10
  - Sjuklingahotellið Tórshavn
  - Sjúklingavegleiðarin á Ríkissjúkrahúsinum
  - Samstarv
  - Avbjóðingar
- Flytifuglar og onnur 15

Samstarvsbólkur um markaforðingar 16

Samstarv 16

Menning 16

Niðurstøða 17

Ráðgevingin er ein sjálvognarstovnur, hvørs endamál sambært viðtøkurnar er:

- At **veita** føroyingum í Danmark hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum
- at **reka** upplýsandi arbeiði á nevndu økjum mótvegis einstaklingum, myndugleikum og stovnum her og heima
- at **virka** sum millumlið millum føroyingar í Danmark og myndugleikar og stovnar her og heima innan nevndu øki

Málbólkarnir sum Ráðgevingin vendir sær til er millum annað:

- Føroyingar undir útbúgving í Danmark
- Føroyskir sjúklingar í viðgerð í Danmark og teirra avvarðandi
- Føroyingar, ið ætla sær til Danmarkar og sum ætla sær heimaftur
- Fastbúgvandi føroyingar í Danmark

**Leiðsla**
Ovasta leiðsla stovnsins er ein fýramannað nevnd:

Marianna Andreassen, cand.scient.soc., forkvinna, umboð fyri brúkarar.
Marita Dalsgaard, cand.oecon, næstforkvinna, umboð fyri Føroya Landsstýri.
Bjørg Svartá, sosialráðgevi, umboð fyri starvsfólkið.
Ingrid Jensen, sosialráðgevi, umboð fyri starvsfólkið

**Grannskoðari:** NUMO Spf. – Símun Absalonsen

**Fíggjarviðurskifti**
Virksemi stovnsins verður fíggjað við stuðulsjáttan á Fíggjarløgtingslógini. Stuðulin verður latin sambært treytum, ásettum í reglugerð um stuðulsjáttan til Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark. Játtan fyri 2024: 1.398.000 kr. Megin útreitslan er løn v.m. til starvsfólk og síðani rakstur av skrivstovuni.

**Skrivstova**
Ráðgevingin hevur skrivstovu á Sendistovu Føroya á Norðuratlantsbryggjuni, Strandgade 91, 4., 1401 København K.

**Starvsfólk**
Tveir sosialráðgevar, Bjørg Svartá og Ingrid Jensen arbeiða 31 hvør um vikuna.

**Upplatingartíðir**
Skrivstovan hjá Ráðgevingini er opin 30 tímar um vikuna og persónlig viðtala er eftir avtalu. Ráðgevingin hevur telefontíð 4 tímar 4 dagar um vikuna, 16 tímar tilsamans. Hvønn mikiudag arbeiðir ein av ráðgevunum á Sjúklingahotellinum Tórshavn.

**Persóndatavernd**
Ráðgevingin fylgir ásettu reglunum í ‘Persondataforordningen’ - GDPR (General Data Protection Regulation) – fyri at verja pesónsupplýsingar hjá viðskiftafólki. Ráðgevingin hevur í hesum sambandinum gjørt ein persóndatapolitik, sum liggur á heimasíðuni hjá Ráðgevingini.

**IT-trygd**
Ráðgevingin hevur sett í verk “Sikker mail”, soleiðis, at vit samskifta við viðskiftafólk og samstarvsfelagar á tryggum grundarlag.

**Nevndarátekning til**
**Ársfrágreiðing 2024 fyri**
**Ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark**

Nevndin fyri Ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark hava dags dato góðtikið ársfrágreiðing 2024 fyri Ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark.
Ársroknskapur 2024 er grannskoðaður og góðtikin og sendur Føroya Landsstýri svarandi til viðtøkurnar fyri stovnin.
Nevndin góðtekur bæði Ársoknskap og Ársfrágreiðing fyri 2024.
Nevndin metir, at ársfrágreiðing og ársrokskapur fyri 2024 geva eina rættvísandi lýsing og mynd av virksemi stovnins.

Keypmannahavn tann 26. mars 2025

Nevndin:

Marianna Andreassen
forkvinna, brúkaraumboð

Marita Dalsgaard
næstforkvinna, umboð fyri Føroya Landsstýri

Bjørg Svartá
starvsfólkaumboð

Ingrid Jensen
starvsfólkaumboð



Síða 5 af 17

## Innleiðing

Ráðgevingin er ein tvítjóðað ráðgeving millum Danmark og Føroyar, grundfest lokalt og nationalt innan ríkisfelagskapin. Ráðgevingin er partur av umhvørvinum av føroysku felagsskapunum í Keypmannahavn, vit eru umboðaði í Umboðsráðnum í Føroyahúsinum og vit hava skrivstovu á Norðuratlantisku Bryggjuni, har sum Sendistova Føroya eisini heldur til.

Ætlanin við ársfrágreiðingini er, at lýsa virksemi í Ráðgevingini í farna árinum, at greiða frá hvussu arbeiðið í Ráðgevingini er skipað, raðfesting av uppgávum, samstarv við stovnar og feløg í Føroyum og í Danmark og rakstur og menning í nevndini fyri Ráðgevingina, fyri starvsfólkini og fyri stovnin.

Fyrispurningarnir til Ráðgevingina eru nógvir og sera fjøltáttaðir – frá einstaklingum, feløgum, stovnum og politikarum úr Danmark og úr Føroyum. Ráðgevarnir arbeiða sostatt á fleiri stigum við lóggávu og viðurskiftum í báðum londunum. Vit átaka okkum tær uppgávur, sum vit meta eru umfataðar av endamálsorðingini í viðtøkunum hjá Ráðgevingini.

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir spurningarnir til Ráðgevingina:




Grundarlagið fyri virkseminum í Ráðgevingini er játtanin á Fíggjarløgtingslógini og vit fara eisini at lýsa, hvussu vit raðfesta fíggjarliga tilfeingi og fáa sum mest burturúr.

Ráðgevingin hevur í nógv ár skrásett allar áheitanar navnleysar fyri at skjalprógva virksemi í mun til játtanina á fíggjarløgtingslógini og í mun til menning av virkseminum í Ráðgevingini. Almanna- og mentamálaráðið hevur gjørt vart við, at skrásetingin er ikki neyðug longur í mun til játtanina, men vit hava avgjørt at halda fram við skrásetingini við atliti til menning av virkseminum.

## Átaksøki í Ráðgevingini í 2024

Á hvørjum ári hevur nevndin í Ráðgevingini eitt seminar – vit fara burtur frá dagliga arbeiðinum og seta 2 arbeiðsdagar av, at arbeiða við menning av starvsfólkum og stovninum í mun til framtíðar avbjóðingar. Í 2024 hava hesi evni verið átaksøki:

1. Trygd- og dygdarmenning
2. Játtanin til Ráðgevingini
3. Sjónliggerðan av stovninum alment

**1. Trygd- og dygdarmenning**

Ráðgevingin arbeiðir áhaldandi við trygdar- og dygdarmenning á ymiskum stigum og frá ymiskum sjónarhornum. Í miðdeplinum er at menna praksis og samstarv innan- og uttanhýsis.

**3. Játtanin**

Játtanin til Ráðgevingina fyri 2024 var 1.398.000 og raksturin er innanfyri játtanarkarmin. Onki verður brúkt av eginognini í løtuni og sambært fíggjarætlanini fyri komandi árið verður raksturin innanfyri játtanarkarmin.

Játtanin til Ráðgevingina er ein stuðulsjáttan, hon verður ikki javnað við vøkstrinum í samfelagnum á hvørjum ári og tí er neyðugt at søkja um hægri játtan við jøvnum millumbili.

Lønarútreiðslur, skrivstovuleiga og skrivstovuvirksemi í ár er 92% av játtanini og vit hava brúkt 95% av játtanini til Ráðgevingina í 2024.

Tey komandi árini skal Ráðgevingin raðfesta at dagføra førleikarnir hjá starvsfólkunum at viðlíkahalda heimasíðuna og miðla vitan á sosialu miðlunum. Ætlanin er at gera eina verkætlan, at uppseta og seta í gongd arbeiðið á til dømis Instagram – at seta ein lesandi við kt-førleikum í starv í 3 mánaðir.

Sum er, er ikki peningur til eina slíka verkætlan, men ætlanin er at søkja um hægri játtan til Ráðgevingina í 2026.

Nevndararbeiðið, sum forkvinnan og næstforkvinnan gera er alt sjálvboðið arbeiðið. Nevndin hevur fund fýra ferðir um árið og á hvørjum árið hevur nevndin nevndarseminar við fokus á menningararbeiðið av virkseminum í Ráðgevingini.

**4. Sjónliggerðan**

Sjónliggerðan av stovninum er áhaldandi á breddanum.

Ráðgevingin raðfestir at luttaka í ymiskum tiltøkum, sum eru ætla málbólkunum, til dømis MFS, sum skipar fyri ymiskum tiltøkum fyri ung lesandi bæði í Føroyum og í Danmark. Vit raðfesta at fara til Føroyar á arbeiðsferð annað hvørt ár við tí endamáli, at styrkja samstarvið við stovnar og feløg sum vit samstarva við.

Í 2024 luttóku vit á tiltakinum "Pisudagar" í Føroyum og í einum tiltakið, sum MFS skipaði fyri í Føroyahúsinum í Keypmannahavn fyri lesandi í Danmark.

Á arbeiðsferðini í Føroyum í 2024 raðfestu vit, at vitja stovnar og feløg sum vit samstarva við um bólkin av sjúklingum, Landsstýriskvinnuna í Heilsumálum, Margit Stórá, Klaksvíkar Sjúkrahús og serliga endurvenjingardeildina har, Deildina fyri børn og ung hjá Almannaverkinum, Krabbameinsfelagið og Beran.
Umframt hetta vóru vit á fundi við Taks, deildini fyri útland – vit fáa nógvar fyrispuningar frá viðskiftafólkum um skattaviðurskifti í Føroyum.

## Miðlan

Arbeiðsorkan í Ráðgevingini er sum áður nevnt tvey starvsfólk á 31 tímar hvør og upplatingartíðin er 30 tímar um vikuna. Talið av viðskiftafólkum, sum venda sær persónliga til Ráðgevignina tey seinastu trý árini er millum 775 – 984 um árið. Fleiri viðskiftafólk søkja sær vegleiðing á heimasíðuni og á sosialu miðlunum hjá Ráðgevingini, og hetta merkir, at starvsfólkini raðfesta miðlan av vitan á heimasiðuni og á sosialu miðlunum. Fyrispurningarnir til Ráðgevingina eru ymiskir, teir kunnu vera umfatandi og hava við sær tíðarkrevjandi málsviðgerð og viðtalur, og teir kunnu eisini vera einfaldir og skjótir at avgreiða.

Heimasíðan hjá Ráðgevingini er sera væl vitjað og tí er sera umráðandi at raðfesta arbeiðið at dagføra heimasíðuna, soleiðis at ein partur av viðskiftafólkunum kunnu fáa hjálp til sjálvhjálp har. Tey yngru viðskiftafólkini hjá Ráðgevingini søkja sær vitan og vegleiðing á sosialu miðlunum og tí raðfesta vit, at miðla vitan og vegleiðing á til dømis Facebook og ætlanin er eisini at viðka tað til Instagram.

Vit kunnu sostatt røkka fleiri viðskiftafólkum, bæði til persónliga ráðgeving til einstaklingar og við miðlan á heimssíðuni og á sosialu miðlunum, við verandi starvsfólkaorku.

## Málbólkar

Sum áður nevnt eru tað ávís viðskiftafólk, sum venda sær til Ráðgevingini og yvirskipað hava vit býtt tey í hesar bólkar:

- Lesandi
- Sjúklingar
- Flytifuglar og onnur

Í ársfrágreiðingini lýsa vit málbólkarnir nærri – hvørji eyðkenni eru, hvørjar eru arbeiðsuppgávurnar, hvussu samskifta vit við málbólkin, hvønn samstarva vit við. Vit lýsa eisini tær avbjóðingar sum vit meta eru í mun til føroysku vælferðarskipanirnar.

## Lesandi

Størsti bólkurin av viðskiftafólkunum hjá Ráðgevingini er lesandi – tey eru áleið helmingurin av samlaðu viðskiftafólkunum.




Bólkurin av lesandi er sera fjøltáttaður, tað eru ung, sum just eru liðug við miðnám, ung sum er liðug við eina miðallanga útbúgving og fara at lesa víðari, ungar barnafamiljur, einsamallir uppihaldar og tilkomin.

Vit fáa eisini fyrispurningar frá ungum lesandi sum hava serligar avbjóðingar og hava tørv á serligum stuðli í samband við lesnað. Nógv foreldur venda sær eisini til Ráðgevingina um børn teirra, sum skulu uttanlanda at lesa, ella sum eru undir lesnaði í Danmark.

Lesandi venda sær ofta til Ráðgevingina áðrenn tey flyta til Danmarkar, tey ivast í hvussu tey fáa danskt cpr-nr, nær kunnu tey søkja útbúgvingarstuðul, hvussu flyta tey, og hvussu fáa tey bústað.

## Pisudagar

Søguliga hava Ráðgevingin og MFS samstarvað um tiltakið "Pisudagar", sum er í Føroyum hvørt ár beint eftir Ólavsøku – tá tey hava fingið svar um upptøku á útbúgvingarstovnum. Tiltakið hevur í nógv ár verið hildið í samstarvi við Betri Banka og við Vegleiðingarstovuna. Vit luttaka eisini á tiltøkum fyri lesandi í Keypmannahavn sum MFS skipar fyri. Betri Banki er ofta partur av tiltøkunum hjá MFS og stuðlar tiltøkunum fíggjarliga. Føroya Banki hevur eisini skipa fyri einum líknandi tiltaki, sum vit hava luttikið í,men tað hevur bert verið einstøk ár og tað er ikki eitt afturvendandi tiltak.
Ráðgevingin raðfestir at luttaka á hesum tiltøkum tí vit eisini á henda hátt fáa samband við tey lesandi og vit fáa innlit í hvørjar spurningar tey hava í samband við lesnaðin.

At flyta uttanlanda og fara undir lesnað er ein stór broyting fyri tey lesandi. Almennu skipaninar, SU, Skattur, Heilsuverk o.a virkar á ein annan hátt og nógvir spurningar eru:

- ***SU – lestur***
- ***Flyting – bústað***
- ***Skattur – føroyafrádráttur***
- ***Hernaðarskylda***

Tey sum venda sær til Ráðgevingina hava serliga spurningar viðvíkjandi hesum evnum.

Afturvendandi spurningarnir hjá teimum lesandi er um skattaviðurskifti bæði í Føroyum og í Danmark. Nógv lesandi arbeiða hjá føroyskum arbeiðsgevarum bæði í Danmark og í Føroyum, og onnur fara til Føroyar at arbeiða í summarfrítíðini og í frítíðini annars. Tey ivast í hvørjum landi tey eru skattskyldug í og hvussu tey skulu uppgeva inntøkuna. Tey kunnu søkja um føroyafrádrátt hjá Skat í Danmark, og nógvir ivaspurningar standast av hesum.

Ráðgevingin raðfestir at menna kunningina um skattskyldu og føroyafrádrátt á heimssíðuni – nágreiniligar leiðbeiningar eru til taks, soleiðis at tey fáa hjálp til sjálvhjálp

Ráðgevingin vegleiðir eisini lesandi um møguleikar og rættindi í mun til útbúgving, eisini tá talan er um avbjóðingar ella broytingar í útbúgvingarætlan.

## Samstarv

Tá yvirskipaðir ivaspurningar eru um føroyfrádrátt og aðrir skattaspurningar hjá lesandi hevur Ráðgevingin samskifti við starvsfólk hjá Skat í Danmark og við starvsfólk hjá Taks í Føroyum.
Á arbeiðsferðini hjá Ráðgevingini í 2024 vóru vit á fundi við Taks útland og viðgjørdu eisini serliga spurningin um skattskyldu hjá føroyskum lesandi.

Í samband við ráðgeving og vegleiðing til lesandi, samstarvar Ráðgevingin við Vegleiðingarstovuna, Meginfelag føroyska studenta, Statens Uddannelsesstøtte, Útbúgvingarstovnar, TAKS og SKAT v.m.

## Sjúklingar

Føroyingar, sum eru vístir til viðgerðar á donskum sjúkrahúsum er tann málbólkurin hjá Ráðgevingini, sum hevur flestar sosialar fyrispurningar. Hesir spurningar hava ofta við sær meira tíðarkrevjandi málsviðgerð. Søguliga hevur hesin málbólkurin verið áleið 20 – 25 % av viðskiftafólkunum. Viðurskiftini eru broytt hesu seinnu árini, sjúklingar ferðast nógv meira ímillum í dag, viðgerðartíðin kann eisini vera styttri tí ein partur av viðgerðini kann fara fram í Føroyum, o.s.fr.

Sjúklingar, sum koma til Danmarkar í viðgerð og teirra avvarðandi hava ofta nógvar avbjóðingar í samband við at vera langt heimanífrá í styttri og longri tíðarskeið. Frástøðan frá heimi og arbeiði hevur við sær avbjóðingar í mun til at forsyrgja sær og familjuni og at vera um familjuna annars. Tí er umráðandi, at sjúklingar og avvarðandi fáa vegleiðing um rættindi og møguleikar so tíðliga í sjúkugongdini sum gjørligt.




Hóast hesin bólkurin av viðskiftafólki ikki er so stórur í vavi, hevur arbeiðið ofta við sær tíðarkrevjandi málsviðgerð. Yvirskipað er talan um at ráðgeva um føroysku vælferðarskipaninar og vísa á hvussu tey fáa atgongd til skipanirnar.

Fyrispurningar frá sjúklingum og avvarandi eru í einstøkum føri einfaldir og skjótir at avgreiða, t.d. vera millumlið millum borgaran og stovnar í Føroyum í mun til fíggjarligar veitingar til ymiskar vælferðarskipanir.

Aðrir fyrispurningar eru samansettir og tíðarkrevjandi. T.d. tá talan er um sjúklingar, sum koma til Danmarkar í samband við bráðfeingis/álvarsliga sjúku, og familjur við álvarsliga sjúkum børnum. Sjúklingar og avvarðandi er ófyrireikaði og skulu fyrihalda seg til sjúkuna, mentanina í Danmark og brátt íkomnu støðuna, meðan tey eru langt heimanífrá. Støða skal takast til arbeiðsviðurskifti, fíggjarstøðu, barnaansing og annað. Umráðandi er at veita skjóta og munagóða ráðgeving og vegleiðing, soleiðis at neyðugar fyriskipanir verða settar í verk.

Talan kann vera um uppgávur, sum hava við sær at Ráðgevingin samstarvar við føroyskar og danskar mynduleikar, og í summum førum eisini onnur lond. Sum dømi kunnu nevnast tryggingarútgjald í samband við lívshættisliga sjúku, útgjald í samband við sjúku/óarbeiðsføri hjá føroyingum, sum starvast hjá arbeiðsgevarum í øðrum norðanlondum.

Er talan um familjur við børnum, kann tað gerast neyðugt við ansing av børnum á stovni ella skúlagongd í Danmark. Í slíkum málum hevur Ráðgevingin ein samskipandi leiklut og vit eru millumlið millum sjúklingar, avvarðandi og mynduleikarnir í Føroyum og í Danmark.
Ráðgevingin tryggar føroyskum børnum í skúlaaldri, sum uppihalda sær í Danmark í samband við egna sjúka ella tá foreldur ella systkin eru í sjúkraviðgerð í Danmark, vegleiðing um rættindi í mun til undirvísing og skúlagongd.

Seinnu árini hava vit fingið fyrispurningar frá einum nýggjum málbólki, sum er útlendingar – hjúnafelagar hjá føroyingum, fólk sum arbeiða í Føroyum, foreldur til sjúk børn o.s.fr. Út yvir vanligu fyrispurningarnir hevur hesin málbólkurin ein serligan trupuleika. Útlendingarnir hava uppihaldsloyvi í Føroyum, men tað er ikki galdandi í Danmark. Hetta kann gerast ein trupuleiki

hjá teimum tá tey skulu aftur til Føroyar. Tey skulu søkja um serligt uppihaldsloyvi áðrenn tey fara til Danmarkar, men tað verður ikki altíð gjørt.

## Sjúklingahotellið Tórshavn

Ráðgevingin samstarvar við Sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn og annar sosialráðgevin í Ráðgevingini er til arbeiðis á Sjúklingahotellinum ein dag um vikuna.
Vit samstarva við sjúkrarøktarfrøðingarnar á hotellinum um yvirskipaði viðurskifti og um ráðgeving og vegleiðing av einstaklinginum og familjum, sum koma til Danmarkar í sjúkraørindum.

- ***Ráðgeva og vegleiða í persónligum og sosialum spurningum***
- ***Upplýsa um rættindi***
- ***Hjálpa við umsóknum***
- ***Virka sum sambindingarlið millum sjúkling, mynduleika og stovn***
- ***Stuðla við samrøðum***

Uppgávur hjá sosialráðgevanum hjá Ráðgevingini á Sjúklingahotellinum.

Starvsfólkini á hotellinum kunna sjúklingarnar um møguleikan fyri sosialráðgeving, og vit hava samrøður við sjúklingar, einsamallir ella í felagssamrøðu við sjúkrarøktarfrøðingarnar á hotellinum.

Í samband við arbeiðið á Sjúklingahotellinum raðfestir Ráðgevingin regluligt samstarv við Krabbameinsfelagið í Føroyum, og vit vitja stovnin tá vit eru á arbeiðsferð í Føroyum. Vit virka sum sambindingarlið til Krabbameinsfelagið, vísa sjúklingunum á møguleikan at søkja um fíggjarligan stuðul úr Hjálpigrunninum og um møguleikan at fáa annan stuðul frá Krabbameinsfelagnum. Á sama hátt vegleiða vit foreldrum til børn við álvarsligari sjúku á møguleikan at søkja um fíggjarligan stuðul úr Rynkeby grunninum. Á tann hátt virka vit sum bindingarlið til heilsuverkið í Føroyum, tí starvsfólk í Heilsuverkinum eru í nevndini í Rynkebygrunninum.

Vit raðfesta eisini samstarvið við Beran og vitja stovnin tá vit eru á arbeiðsferð í Føroyum. Vit hava verið við til at skipa soleiðis fyri, at tey serligu pinkubarnaskríni, sum Berin letur til foreldur í samband við pinkubarnadeyða, eru til taks á Sjúklingahotellinum Tórshavn. Tað kemur meira enn so fyri at børn, sum eru í sjúkraørindum í Danmark doyggja og á henda hátt kunnu foreldrini fáa pinkubarnaskrín frá Beranum. Endamálið er, at foreldur og systkin fáa samband við Beran og atgongd til tey tilboð sum Berin veitir.

## Sjúklingavegleiðari

Ein føroyskur sjúkrarøktarfrøðingur er settur sum sjúklingavegleiðari og hon heldur til á Ríkissjúkrahúsinum, umframt á Sjúklingahotellinum Tórshavn. Vit samstarva við sjúklingavegleiðarin um teir sjúklingar, sum eru innlagdir og við tær barnafamiljur, sum búgva í Ronald Mcdonald húsinum, sum er partur av Ríkissjúkrahúsinum. Barnafamiljur, sum uppihalda sær í longri tíð í Danmark í samband við sjúkraviðgerð hjá børnum, búgva í Ronald Mcdonald húsinum – har eru umstøður til at bæði foreldur og systkin kunnu búgva og at familja í Føroyum kann koma at vitja.

Vit samstarva eisini við sjúklingavegleiðaran um teir sjúklingar, sum tørva neurorehabiliterandi viðgerð í Danmark og saman við henni eru vit bindingarlið til rehabiliterandi viðgerð í Heilsuverkinum í Føroyum og til Almannaverkið.

Á arbeiðsferðini hjá Ráðgevingini í 2024 vóru vit og vitjaðu endurvenjingardeildina á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, soleiðis at vegleiðingin frá okkum er so neyv sum møguligt bæði í mun til sjúkling og tey avvarðandi.

## Samstarv

Sum áður nevnt virka vit sum bindingarlið millum stovnar í Føroyum og Danmark eisini innan Heilsuverkið og tí er umráðandi at vit hava dagførda vitan og kunnleika um tey tilboð sum sjúklingar og avvarðandi koma heim aftur til.

Ráðgevingin arbeiðir áhaldandi við rehabiliterandi tilgongd og arbeiðshátti, ið hevur til endamáls at stuðla og birta undir menning og endurmenning hjá sjúklingum. Ráðgevarnir í Ráðgevingini og sjúkrarøktarfrøðingarnar á Sjúklingahotellinum hava øll verið á skeið í IPLS, sum er eitt serligt háttlág at samstarva við sjúkling, avvarðandi og yrkislærd - serliga at hoyra sjúklingin í tvørfakligu tilgongdina. Fokus er á rehabilitering og endurmenning bæði í mun til heilsu og sosial viðurskifti.

Á arbeiðsferðini í Føroyum í februar 2024 luttóku vit eisini á einum tiltakið um "linnandi viðgerð ta seinastu tíðina" sum eldrafeløgini í Norðuroyggjum og í Eysturoy skipaðu fyri í Løkshøll. Eitt sera áhugavert og læruríkt tiltak. Vit fingu innlit í hvørji tilboð eru til hesar sjúklingar í Føroyum og hvørjar avbjóðingar eru á økinum. Vit eru javnan í samband við sjúklingar og avvarðandi sum hava tørv á vegleiðing um palliativt viðgerðartilboð í Føroyum.

Ráðgevingin hevur áhaldandi fokus á børn sum avvarðandi til álvarsliga sjúk foreldur ella systkin. Børnini eru ofta stødd í Føroyum, og tí ikki sjónlig her, men tað er alneyðugt, at tað verður tosað við foreldrini um, hvussu børnini hava tað og ráðgeva og vegleiða um møguligar fyriskipanir. Stuðla familjunum og hjálpa foreldrum at hjálpa børnum teirra best møguligt.

Fokus hevur eisini verið á fakliga menning innan arbeiði við børnum sum avvarandi. Seinastu árini hava ráðgevarirnir javnan luttikið á ráðstevnum innan børn sum avvarandi.

## Avbjóðingar

Gjøgnum arbeiðið og samskifti við viðskiftafólk og samstarvsfelagar, gerast vit varug við ymiskar avbjóðingar ella ójavnar í vælferðarskipanunum í Føroyum.

Í flestu førum hevur sjúklingurin rætt til løn ella sjúkradagpening undir sjúku meðan rættindini til almennar fyriskipanir eru ymiskar fyri tey avvarðandi, sum eru fylgjarar hjá sjúklinginum. Hjún og foreldur til børn við álvarsligari (deyðiligari sjúku), sum eru fylgjarir hjá sjúklingum í viðgerð, hava møguleika at søkja um sjúkradagpening sambært lóg um dagpening vegna sjúku, meðan øll onnur – samlivandi, foreldur til børn yvir 18 ár, børn hjá eldri fólki o.s.fr. ikki hava møguleika at søkja um sjúkradagpening, hóast tey eru fylgjarar hjá sjúklingum í viðgerð í Danmark.

Ein serlig avbjóðing er rætturin til meirútreiðslur sambært § 24 og rætturin til endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 25 í Almannalógini til foreldur hjá børnum við álvarsligari sjúku, sum er í sjúkraviðgerð í Danmark. Almannaverkið ger vart við, at tey meta at tað er ein serligur málbólkur av børnum við ávísum sjúkum, sum kunnu fáa slíkan stuðul. Vit hava fleiri dømi um, at Almannaverkið metir, at børnini eru ikki í málbólkinum, hóast børnini av læknunum á Ríkissjúkrahúsinum verða mett at vera álvarsliga sjúk, í lívsvanda og í einstøkum føri eru deyð av sjúkuni.

Málbólkurin, er lýstur soleiðis í § 24 stk 1:

*"Persónur, sum í heiminum uppiheldur barni við likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku, hevur rætt til at fáa endurgoldið neyðugar meirútreiðslur, ið eru ein beinleiðis avleiðing av brekinum ella sjúkuni."*

Praksis hjá Almannaverkinum er, at lata læknafakligan ráðgeva taka støðu til spurningin um sjúkan hjá barninum er í málbólkinum, og tað er avgerandi fyri málið.
Okkara meting er, at hetta kann vera ein ójavni millum familjurnar, sum uppihalda sær í Danmark orsakað av sjúkuviðgerð hjá børnum. Børnini kunnu vera eins sjúk, men avgerandi er, hvør sjúka talan er um. Familjurnar búgva ofta saman í Ronald Mcdonald húsinum, tey tosa saman, og at síggja til hava tey sama tørv á at fáa endurgjald fyri meirútreiðlsur og fyri mista arbeiðsinntøku.

Orsakað av hesum metir Ráðgevingin, at ein kunngerð sum skilgreinar málbólkin í § 24 og § 25 í Almannalógini hevði verið viðkomandi.

Ráðgevingin hevur í nøkur ár gjørt Almannamálaráðið varug við at fólk, sum liva saman sum hjún, og eru fylgjarar hjá samliva, sum eru í Danmark í viðgerð, ikki hava somu rættindi í lógini um sjúkradagpening, sum hjún hava.

Ein onnur avbjóðing er, sjúklingar í viðgerð í Danmark og teirra rættindi til veitingar frá Heilsutrygd, til dømis um tey hava tørv á tannlækna- ella sálarfrøðiligari hjálp meðan tey uppihalda sær í Danmark. Ráðgevingin hevur gjørt myndugleikarnir í Føroyum varugar við, at

málbólkurin ikki hevur somu rættindi til veitingar (endurgjald frá Heilsutrygd), sum sjúklingar, sum eru í viðgerð í Føroyum.

Eitt annað dømi er rættindini hjá fylgjarum generelt hjá sjúklingum at fáa møguleika til fíggjarligar veitingar, tá tey missa arbeiðsinntøku, orsakað av uppihaldinum í Danmark. Her er tað relatiónin til sjúklingin, sum er avgerandi fyri um fylgjarin fær endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku ella sjúkradagpengar.

## Flytifuglar og onnur

Umframt tey lesandi og sjúklingarnir í viðgerð í Danmark eru onnur viðskiftafólk, sum søkja sær vegleiðing hjá Ráðgevingini. Tað eru tey, sum flyta ímillum londini, tey við serligum tørvi, sum hava fastan bústað í Danmark, tey sum flyta til Danmarkar til børnini, tá tey gerast pensionistar o.s.fr.




Fyrispurningarnir frá hesum bólkinum er sera fjøltáttaðir, til dømis

- Skattaviðurskifti í báðum londum
- Pensión úr báðum londum
- Flyting av bili
- Sjúkraviðgerð í Danmark
- Barsilsskipanin í báðum londum
- Fíggjarligt óføri
- Fastbúgvandi við sosialum tørvi

Fleiri dømi eru um føroyingar, sum eru av tí fatan, at teir hava somu rættindi sum danir til sjúkraviðgerð ella til serlig tilboð, um teir hava serligan tørv. Føroyingar, sum ferðast í Danmark, hava rætt til bráðviðgerð, og tað er neyðugt hjá teimum at hava ferðatrygging, sum tey hava tørv á áhaldandi viðgerð/sjúkraflutningi. Um tey ikki hava tað, skulu tey sjálvi gjalda fyri sjúkraflutningin heim.

Ráðgevingin fær nógvir fyrispurningar frá føroyingum, sum flyta millum londini, bæði í mun til arbeiðsinntøku, skat, pension og til sosialar veitingar. Talan kann vera um samansettar skattaspurningar, og viðskiftafólk, sum hava trupuleikar at fáa rætta vegleiðing frá mynduleikanum í Danmark, og tey sum hava tørv á serligari hjálp at samskifta við mynduleikarnir í báðum londum. Ráðgevingin til hesi kann fevna bæði um føroyska og danska lóggávu.

Í ávísum førum, er talan um yvirskipaðir trupuleikar, møguligar markaforðingar og í slíkum føri taka vit fyrispurningin upp í bólkinum sum arbeiðir við markaforðingum.

## Samstarvsbólkur um markaforðingar

Ráðgevingin er partur av og samskipar samstarv millum Sendistovu Føroya í Keypmannahavn, føroysku fólkatingsumboðini. Endamálið við samstarvinum er, at seta fokus á rættindi hjá føroyingum, sum flyta millum Føroyar og Danmark. Samstarvsbólkurin arbeiðir yvirskipað við markaforðingum og hevur tveir fundir árliga.
Ráðgevingin samskiftir við nógv viðskiftafólk og gerast tá varug við viðurskifti, sum kunnu vera ein markaforðing hjá føroyingum í Danmark. Vit kanna og lýsa málini í samstarvsbólkinum og saman finna vit loysnir – um talan ikki er um eina markaforðing ella um talan er um markaforðing, sum embætisfólk og føroysku fólkatingslimirnir arbeiða fyri at broyta. Eitt dømi um hetta var, tá føroyingar í Danmark, fingu møguleika at fara til Føroyar at ansa teirra nærmastu, ta seinastu tíðina. Tað vil siga at føroyingar vóru javnsettir við danir at fáa røktarfarloyvi sambært donsku Servicelógini.

Í 2024 hava tveir fundir verið hildnir í samstarvsbólkinum tann fyrri á Christiansborg og hin seinni hjá Sendistovu Føroya á Norðuratlantisku Bryggjuni.

## Samstarv

Ráðgevingin hevur havt samband við danskar myndugleikar bæði um yvirskipaði og ítøkilig mál. Her kann nevnast SKAT Udland, sum vit regluliga samskifta við vegna okkara viðskiftafólk, viðvíkjandi tulking av reglum innanfyri føroyafrádrátt og skatting av ogn og inntøku í útlandinum/Føroyum v. m. Arbeiðsmarknaðurin er broyttur, fólk arbeiða í einum landi og búgva í einum øðrum landi, onnur arbeiða heima fyri ein arbeiðsgevara í einum øðrum landi o.s.fr. Skattaskipanin kann vera kompleks í slíkum føri, og vit fáa nógvir spurningar í hesum sambandi.

Vit hava eisini haft samskifti við SU um ávísar avbjóðingar fyri føroysk lesandi. Ráðgevingin hevur javnan samband við danskar stovnar í samband við einstaklingamál og eisini um meira yvirskipaði viðurskifti.

## Menning

Ráðgevingin arbeiðir áhaldandi við menning bæði í mun til stovnin, nevndina og til starvsfólkini. Innanhýsis ímillum starvsfólkini er arbeiðið skipa soleiðis, at ráðgevarnir halda skipaðar fundir, og bæði arbeiðsuppgávur og samstarv á stovninum eru á dagsskrá.

Leiðslan í Ráðgevingini raðfestir at skipa fyri árligum nevndarseminar við tí endamáli, at seta fokus á átaksøki fyri komandi árið í Ráðgevingini og menning av stovninum annars. Ráðgevarnir luttaka á ymiskum viðkomandi evnisdøgnum, skeiðum og ráðstevnum, við atliti til fylgja menningini og broytingunum á arbeiðsøkinum hjá Ráðgevingini.

## Niðurstøða

Í 2024 vóru 40 ár liðin síðan Ráðgevingin var stovnað, og vit meta, at stovnurin er líka viðkomandi og neyðugur enn. Nógvar broytingar hava verið hesi árini og hóast tað, uppihalda nógvir føroyingar sær framvegis í Danmark í styttri og longri tíðarskeið, í lestrarørindum, í sjúkraviðgerð, í samband við arbeiðið og annað. Hesi hava framvegss tørv á ráðgeving og vegleiðing um sosialar og praktiskar spurningar og Ráðgevingin virkar framvegis sum bindilið fyri viðskiftafólk millum stovnar og feløg í Danmark og í Føroyum.

Á sama hátt síggja vit áhaldandi yvirskipaðir spurningar taka seg upp um markaforðingar, sum vit samstarva við arbeiðsbólkin á Sendistovuni og í Fólkatinginum um.

Játtanin til Ráðgevingina á fíggjarløgtingslógini er grundarlagið fyri virkseminum í Ráðgevingini, og sum er, ber til at varðveita raksturin innanfyri játtanarkarmin. Talan er um eina stuðulsjáttan og vit vænta, at neyðugt verður at søkja um hægri játtan í 2026, orsakað av almenna vøkstrinum í samfelagnum.

Viðskiftafólkini eru eisini grundarlagið fyri virkseminum í Ráðgevingini og seinastu trý árini hevur talið av teimum, ið venda sær persónliga til ráðgevingina verið millum 775 – 984. Fleiri viðskiftafólk søkja sær vitan og vegleiðing frá Ráðgevingini á talgildu miðlunum, og tað hevur við sær, at starvsfólkini raðfesta at dagføra hesar skipanir. Samlaðaða talið av viðskiftafólki ið vendir sær til Ráðgevingina er soleiðis størri enn samlaða talið av teimum, ið venda sær persónliga til Ráðgevingina.

Ráðgevingin raðfestir at samstarva við viðkomandi fakbólkar um ávís viðskiftafólk, serliga bólkin av sjúklingum og vit hava dygdargott samstarv við stovnar og feløg í Danmark og í Føroyum.

Leiðslan í Ráðgevingini hevur øll árini raðfest at starvsfólkini eru útbúgvin sosialráðgevar, og metir, at førleikarkarnir hjá starvsfólkunum eru avgerandi fyri virksemið í Raðgevingini. Størsti parturin av fyrispurningum til Ráðgevingina er av sosialum slag og tað eru eisini tær uppgávurnar, sum hava við sær tíðarkrevjandi málsviðgerð.

Nevndin er væl nøgd við árið, sum farið er, og arbeiðir nú við at áseta átaksøki fyri Ráðgevingina í 2025.